# »Gorch Fock« vitjar Havnina



**Frá hósdegnum komandi, 16. mai, til sunnudagin 19. mai vitjar týska seglskipið, »Gorch Fock«, hjá týsku sjóverjuni í Havn. Skipið kemur við yvir 200 monnum og kvinnum umborð úr heimstaðarhavnini, Kiel. Hetta er 129. uttanlandsferðin hjá skipinum – og er ferðin 7877 sjómíl til longdar. Á ferðini vitjar skipið Bergen, Reykjavík, Havnina og Aberdeen**

SKÚLASKIP
*Eirikur Lindenskov*

»Gorch Fock« er trímastrað bark. Skrokkurin og mastrarnar eru úr stáli. Hon er bygd í Hamburg á skipasmiðjuni »Blohm & Voss«, og varð tikin í nýtslu í 1958. Hon hevur við sínum yvir 120 uttanlandsferðin siglt yvir 600.000 sjómíl og vitjað 375 havnir í 55 londum í 5 heimspørtum.

Umborð hava verið fleiri høgtmettir gestur ú røllum heiminum. Seinna hálvárið 2002 fer »Gorch Fock« til Portugal og Spania eins og til norðurafrikansku strondina.

Í sponsku havnini, Almeria, koma týski forsetin, Johannes Rau og spanski kongurin, Juan Carlos II, umborð. Í Havn kemur týski sendiharrin í Keypmannahavn, Johannes Dohmes umborð at taka ímóti gestunum saman við kommandantinum, Michael Brün, fregattskipara.

Tað er danska verjan saman við týska honorarkonslinum, Ásu á Dul Jacobsen, sum í felag fyrireika ferðina hjá »Gorch Fock«. Herflotafólkini fáa ríkiliga tíð at fara í land. Týski sendiharrin vil nýta høvi at hitta umboð fyri Føroya Landsstýri og umsitingina, eins og vinnulív, kirkjuna, mentan og skúla.

Meðan skipið var til eftirlit 2000/2001 varð tann higartil størsta nútímansgerðin av skipinum framd. Nýggjur klimaútbúnaður nýggir elektromotorar, nýggj spillivatns- og ferskvatnsskipan eins og nýggjastu navigatiónstól økja livitíðina hjá »Gorch Fock« við 25 árum. Skipið er umbygt eftir strangastu trygdarkrøvum og fekk fyri fyrstu ferð eitt Germanischer Lloyd trygdarbræv.

Manningin telur yvir 200 yvirmenn, bátsmenn og matrósar. Á hesari ferðini fáa 63 næmingar útbúgving. Av teimum eru fimm kvinnur.

Skipið er uppkallað evtir rithøvundanum Johann Kinau, sum varð føddur í 1880. Hann var kendur undir dulnevninum »Gorch Fock«. Kinau var sonur fiskimann, føddur í Hamburg, Finkenwerder. Hann fall í Skageraksslagnum í 1916 umborð á krússaranum, »Wiesbaden«. Í kærleika til sjógv og fjrøu skrivaði hann fleiri stuttsøgur, tann í dag kendasta hevur heitið: »Seefahrt ist not« (Sjóvinna er neyðug)

Leygardagin 18. mai kl 14-17 verður opið fyri almenninginum at vitja umborð, og kl 18 verður fótbóltsdystur millum »Gorch Fock« og B36 í Gundadali.

### Fakta um »Gorch Fock«:

Støðd:
Longd: 89,4 m
Breidd: 12 m
Djúpd: 5,2 m
Deplacement: 1870 t
Hædd á stórmastur: 45,5 m
Størsta rálongd: 24 m
Seglvídd: 2037 fermetrar

Ferð:
Við motori: 14 míl
Við seglum: 16 míl max

Manning:
Yvirmenn: 53
Matrósar: 24
Næmingar: 139 max





Hevur tú lagt ábyrgdarfæið um til partapening?

Vit hjálpa fegin við at fylla út neyðugu skjølini.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo



## Plenuklipparar o.a. til urtagarðsrøkt




Opið er leygardagin frá kl. 9-14
Ger kvetti

**Pf. THOMAS DAM Á HÁLSI**
Heykavegur 3 - Tlf. 311400

THOMAS DAM
Pf. THOMAS DAM
amboð & maskinur
Jónas Broncksgøta 25 • Tel. 31 04 44 • Fax 31 78 38





# Mitsubishi Carisma 1.9Di-D Sport
## 115 hk Hatchback




Einans **211.000,-**



### Útgerð

4 airbags
Aircondition
El-spegl
Fart pilot
Armlen framman
Fløguspælari v/6 hátalarum
Multidisplay
Fjarstýrt sentrallás
Sport setur v/ multi instilling av førarasetri
Hita í setrum framman
Leður róður
Tokulyktir framman
15" alu-felgur



**Leygardagin 11.05 hava vit opið frá kl. 10.00 til 18.00**
**Sunnudagin 12.05 hava vit opið frá kl. 14.00 til 18.00**
**Í hesum sambandið hava vit nógv góð brúktbilatilboð m.a. hesi:**

**Upp til 15.000 kr. í avsláttri**

**Citroen Jumpy 1,9TD 8 ferðandi**
km. 28.200, árg. mars 2000
190.000,-

**Citroen Jumper Ch. v/last**
árg. aug. 1998
Fyrr 150.000 139.000,-

**Citroen Xsara 1,9TD 5H**
km. 83.000, árg. des. 1998
120.000,-

**Citroen Xsara 2,0 HDi Stc. 5H**
km. 83.000, árg. juni 1999
140.000,-

**Mitsubishi L300 2,5D**
km. 161.000, árg. juni 1994
Fyrr 85.000 70.000,-

**Mitsubishi Lancer 1,5 GLXi 5h**
km. 145.000, árg. mai 1992
52.000,-

**Mitsubishi Lancer 5h**
km. 124.000, árg. juni 1992
Fyrr 65.000 50.000,-

**Fiay Tipo 5H**
km. 109.000, árg. mai 1989
26.000,-

**Ford Escort 1,8D CLX 4 h**
km. 187.000, árg. nov. 1995
Fyrr 52.000 45.000,-

**Ford Sierra 2,0i CLX 4h**
km. 110.000, árg. nov. 1991
45.000,-

**Hyundai Accent 1,3 LS 5H**
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

**Mazda E2200 Vøruvognur**
km. 91.500, árg. mars 1997
Fyrr 95.000 85.000,-

**Peugeot 306 1,9D 4H**
km. 150.000, árg. apr. 1995
80.000,-

**Seat Cordoba 1,9SDi STC. 5h**
km. 35.500, árg. aug. 1999
Fyrr 125.000 115.000,-

**Toyota Camry 2.2 GL**
km. 143.000, árg. jan. 1993
80.000,-

**Møguleiki er eisini fyri at royna nýggjar bilar**

*Vælkomin til*
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
**Ivan Johansen Bilar**
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820